# TILTØK

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/ Jannet & Maibritt Olsen.
Fríggjakvøldið kl. 20 After Eight.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Team úr Bergen luttekur.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Martin de Leur í Mariukirkjuni. (Talvan gongur fyri teimum, ið lesa til prest, í Keypmannahavnar bispadømi). Kl. 14 Sunnudagsskúli.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Týsdagin kl. 19.30 Ungdómsskótar (9. fl. – 17 ár), kl. 20 Argjakórið venur.
Mikudagin kl. 19.30 Skótar 5.-8. fl.)
Hósdagin kl. 18 1. Úlvalið (1.-2. fl.), kl. 20 Bíbliutími v/ Jóhs. Mortensen, Argir – Heb. 11.
Fríggjadagin kl. 20 Ungdómsgudstænasta v/ Bergur D. Joensen – Innsavnan fyri HMU.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta, kl. 14 sunnudagsskúli og junior, kl. 15 Barnakórið venur, kl. 18 Møti v/ Rúna Mortensen, Argir o.fl.
www.koma.fo

**Hebron, Argir**
Mikudagin kl. 20 Uppbyggingar- og bønarfundur. Osvald Kjærbo talar um evnið: Bønir Paulusar.
www.hebron.fo

**Samkoman Lívdin**
*Í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin á familjumøti kl. 10.30 er evnið: Hvat segði Jesus um Bíbliuna? og tilbiðjunarmøti kl. 12 er evnið: 1. Korint – At geva. Á báðum møtunum talar Zacharias Zachariasen. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúlin er kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
www.livdin.fo

**Ebenezer**
Mikukvøldið kl. 20 Byrja mánaðarmøtini við evninum: Ávøkstur Andans – Kærleiki.
Hóskvøldið kl. 20 Halda mánaðarmøtini fram við evninum: Ávøkstur Andans – Gleði. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið**
Mikukvøldið kl. 19 Venur Meinigheitskórið.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti har ung úr Fuglafirði luttaka.
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Regin Høgnesen.

**Samkoman Rhema Staravegur 5**
Mikukvøldið kl. 20 Møti við ungdómi úr Alterna úr Danmark.
Sunnudagin kl. 11 Møti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

**Karisma**
Hvítusunnustevnan 2003 verður í døgunum 6.-9. juni í Ítróttarhøllini á Hálsi, har tiltøk verða fyri allar aldursbólkar. Nærri verður lýst seinni.

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20 Møti.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mikudagin kl. 19 í KFUM: Ten-sing kórið venur.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti, øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 19 Delli.
Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
www.filadelfia.fo

**Vestmanna missiónshús**
Hóskvøldið kl. 20 Samtalumøti við evninum forbøn.
Fríggjakvøldið kl. 20 Møti við Kajberg Davidsen o.ø.
Leygarkvøldið kl. 20 Útimøti við eysturoyingum, aftaná lovsangsløta í missiónshúsinum.
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli og kl. 19 Møti við Margeir Toftegaard o.ø. Sangbólkurin Gittit syngur.

**Samkoman í Berøa**
Mikukvøldið kl. 19.30 Bønar- og uppbyggingarfundur, Karl Jóhan Nielsen talar um evni: Hvat sigur Skriftin, eiga vit at giftast? Ungdómsbólkurin á Toftum syngur.
Sunnudagin kl. 11.30 Sunnudagsskúli, kl. 11.30 Minnismáltíð Harrans, kl. 15 Løta fyri foreldrum at børnum undir 2 ár, kl. 19 Evangel. fundur við nógvum lovsangi. Ungdómskórið í Ebenezer, barnakórið í Berøa og fleiri syngja. Kári á Torkilsheyggi og Dánjal í Skemmuni tala.

**Keldan**
Mikukvøldið kl. 20 Felags húsbólkamøti.
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús við Leif Høj.
Sunnudagin l. 11 Morgunmøti, kl. 11 Barnamøti, kl. 19 Evangel. møti. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera verður í Siloa í kvøld kl. 19.30 Zacharias Zachariassen talar. Evni: Bók Nehemiasar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Mikukvøldið kl. 20 Kvinnurnar samlast.
Hóskvøldið kl. 20 Pizzahugnakvøld fyri ung.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

**Getsemane**
*á Brekku 19 Klaksvík*
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20 Spælicafé fyri ung.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við André Matras.

**Missiónshúsið í Skopun**
Í kvøld kl. 20 Bíbliutími. Øll eru vælkomin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 5. mai:*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-18 Veving á loftinum. Seyma teppir saman
kl. 14-18 Kortspæl, landastrok, telving, dart og onnur spøl
*Týsdagin 6. mai:*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur, Benny og Flemming Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Prát
*Mikudagin 7. mai:*
kl. 10-15 Opið hús
kl. 15 Vitja Dimmalætting. Hittast uttanfyri Dimmalætting á Smyrilsvegi 13
*Hósdagin 8. mai*
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát – Brandur Petersen
*Fríggjadagin 9. mai:*
kl. 10-15 Opið hús
kl. 14.30 **Fyribyrging/-fólkaheilsa,** Bill Justinussen

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Dagtilhaldið í Vági**
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

**Tilhaldið í Sandoynni**
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl. 14–17.00. Drekkamuður er at fáa báðar dagarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Mikudagin 7. mai*
Spurningar úr føroyska spælinum Landastrok verða bornir fram.
**Mánadagin 12. mai** fara vit útferð til Húsavíkar har Hanus undir Leitinum sigur frá. Aftaná verður farið í Ísansgarð til ein drekkamunn. Farið verður úr Tilhaldinum kl. 14 við bussi til Húsavíkar. Kostnaður fyri túrin íroknað drekka er 50 kr.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319630/61 655400.

**NA (Anomymir narkomanar)**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur er hvønn hósdag kl. 17.30 til 18.30 og sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Sporafundur verður í kvøld kl. 20-21.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tórsgøta 5 (inngongd vestanfyri). Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

**BRÚKARASAMTAKIÐ**
Brúkarasamtakið er felag fyri brúkarar í Føroyum. Limagjaldið er 100 kr. árliga. Øll, einstaklingar frá 16 ár og feløg, kunnu gerast limir við at skriva til postadressuna niðanfyri, ella venda sær til ein í nevndini: Ingun Simonsen, forkvinna, 317782/211696, ingun@post.olivant.fo
Hans Pauli Strøm, skrivari, 424044/221919, hps@kallnet.fo
Gunnleivur Dalsgarð, kassam., 314868/311210, gunnleiv@starvsmf.fo
Høgni Debes Joensen, 311832, trongrim@post.olivant.fo
Kristina Samuelsen, 311883/211883, kris@logting.fo
Brúkarasamtakið, Postboks 165, 110 Tórshavn

**Spælistovan í Meinigheitshúsinum**
er opin frá kl. 9.00-12.00 mánadag, mikudag og hósdag fyri foreldrum við børnum uttan ansing.

**Heilaskaðaráðgeving**
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, BellaVista, Bellevuevej 7, 2. tv., 2930 Klampenborg, Danmark.
Tú kanst eisini ringja til: tlf. +45 39902665 (Jón) mobil: +45 24430903 (Jón)
www.neozone.dk

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**LFÚ-skrivstovan**
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Samband við felagið fæst við at ringja tlf. 22 95 83.
Umsóknarbløð til Heimavirkisleguna í Danmark í summar kunnu fáast við at venda sær til felagið.

**LISA**
Frá 24. februar er skrivstovan hjá Listafólkasambandið Føroya í Pætursarstovu opin soleiðis:
mánadag, mikudag, hósdag og fríggjadag frá kl. 9-12, týsdag er opið frá kl. 18.30-20.30.
Limir eru vælkomnir inn á gólvið. Tlf. 320197.
teldupostur: lisa@lisa
heimasíða: www.lisa.fo

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Amnesty International, Føroya deild**
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 13.00-17.00 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost: Amnesty-Amnesty.fo

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Heilaskaðaráðgeving**
Hevur tú spurningar um heilaskaðar, afturvenjing ella annað, so ber til at skriva til okkara á "NeuroCom, FO 400 Oyrarbakki", at senda teldupost til: info@neurocom.dk ella at ringja til 225 263.
NeuroCom, Oyrarbakki

**Heilafelagið, MBF-húsið**
Íslandsvegur 10C
tlf./fax 321520
Telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Tórhild, e-mail: torhildm@post.olivant.fo
Hildebjørg, tlf. 313897, e-mail: jwimport@post.olivant.fo
Nakað av bókum eru til láns hjá felagnum.

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
T-post: gikt@gikt.fo
www.gikt.com
Skrivstovan: Tlf. 31 02 37
Opið: týs- og hósdag kl. 11.00-14.00.
**Fibromyalgibólkurin:** Opið mánadag kl. 11.00-13.00.
**Foreldraumboð:** Nicolina Højgaard, heilsusystur tlf. 31 47 50
**Ungdómsumboð:** Sára Tummassardóttir tlf. 37 31 06.

**MÁF**
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya) heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn Tlf. 315624 og 315688, Faks 315924,
e-mail: maf@maf.fo og maf@post.olivant.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Listarligur ráðgevi: Birita Mohr. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

**MBF – Meginfelag teirra brekaðu**
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00.
Íslandsvegur 10C, FO-100 Tórshavn.
Tlf. 317373. Fartlf. 264839. Faks: 310813.
t-postur: mbf@post.olivant.fo
Heimasíða: www.mbf.fo

**Alzheimerfelagið**
Tórsbyrgi 16
100 Tórshavn
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur: sigmo@post.olivant.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102.
Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 svarar týsdag kl. 18–20.

**Javni**
Skrivstovan er opin týsdag til fríggjadag kl. 10.00-14.00.
Adr.: Hoydalsvegur 40, 3. hædd.
Tlf. 314827 – fax 310557
Teldupostur: javni@post.olivant.fo
Heimasíðan www. javni.fo



# Veit ikki um Páll á Reynatúgvu er øvindsjúkur



**Finnur Helmsdal,**
*sum ikki eingang er varamaður longur*

Setti mær fyri fríggjadagin seinna partin í fyrru viku, at eg ikki skuldi fara niður á sama vanliga perfida støði, sum Páll á Reynatúgvu vanliga er at finna. Tí segði eg við fjølmiðlafólkini, at eg onga viðmerking hevði til tað, sum Páll segði um mín persón og mítt politiska arbeiði.

Men tá Páll á Reynatúgvu heldur fram við sínum átálmaða perfiditeti og annars at koma við ósannindum um bæði meg og málið, so haldi eg tíðin er komin at siga eitt sindur meira.

Fólk, sum kenna Páll á Reynatúgvu, eru mest sum givin við at hava nakra meining um tað hann sigur og ger. Fólk yptu bert øksl, tá hann leikaði í sum ein beserkur fríggjadagin fyrrapartin og var um reppið at knúsa bæði rútar, sprossar og karm, tí okkert gekk skeiva vegin. Fólk ristu eisini bert við høvdinum, tá sami maður hunddálkaði meg frá tingsins røðarapalli. Fólk øtaðust kanska eitt sindur, tá hann síðan kom við meira og minni fjaldum hóttanum móti mær, mínum starvi og arbeiðsplássi (sum hann vanliga seinni kallar skemt). Soleiðis sum støðan er, og soleiðis sum alt gongur fyri seg m.a. í flokkinum, hendir helst ikki nógv annað, enn at fólk yppa øksl og siga: Hatta er Páll. Tað tykist ikki, sum nakað maðurin ger ella sigur, skal fáa avleiðingar. Men eg gjørdi so beinanvegin tað, at eg skrivaði løgmanni stutt bræv, har eg upplýsti hægsta umsitingarliga leiðara landsins um tað, Páll hevði sagt um meg og mítt arbeiðspáss, aftan á at han hevði hunddálkað meg frá tingsins røðarapalli. Hetta fyri at viðkomandi myndugleikar eru kunnaðir, áðrenn eg møguliga fari at kenna sviðan. Hevndarhugur landsstýrismansins er eftirhondini vorðin ein sera illa duld loyna millum fólk, sum tó ikki tora at siga nakað alment av ræðslu fyri avleiðingunum.

Ein er eisini sjálvur givin við at undrast ella øsast um atburð og gerðir landsstýrismansins. Hansara ego er so stórt og yvirdimensionerað í allar mátar, at tað passar einfalt ikki inn í lítla likamið. Tí gongur hann altíð og dryppar ella spruttar. Egoið vil sleppa inn, men plássið er ov lítið.

**Men hví lýgur Páll á Reynatúgvu**

Eitt, sum eisini fær meg at skriva hesi orð er, at Páll á Reynatúgvu endurtekur lygnir um meg og mítt politiska arbeiði. Hann segði fríggjadagin, at eg var komin við mínari ónøgd um malið í seinastu løtu. Hetta er loddrøtt lygn, sum hann endurtekur í samrøðu við Dimmalætting. Bæði Páll á Reynatúgvu og Høgni Hoydal vórðu væl og virðiliga kunnaðir um støðu mína i málinum um uppihaldspening, tá málið var til 1. viðgerð langt áðrenn páskir. Tá segði Høgni Hoydal, at hann skilti meg væl, bað meg bíða til eftir viðgerðina, tá málið skuldi verða tikið upp í flokkinum. Men Høgni Hoydal tók ongan tíð hetta málið a tungu, í mun til mín, í flokkinum ella í samgonguni. Hin vegin smæddist hann ikki við at stuðla øðrum tingmonnum í hóttanum um at fara sama við andstøðuni, um okkurt lokalt ikki kom upp á pláss. Og soleiðis verður arbeitt. Tá tað snýr seg um lokal áhugamál og harvið eisini atkvøður, skortar viljin ikki, men snýr tað seg bert um fámentar samfelagsbólkar, tja, tá er missurin ikki nevniverdur.

Soleiðis var støðan fríggjadagin 2. mai. Eg lat menn vita, at eg hevði júst somu støðu, men at eg kundi góðtaka, um broytingin bleiv framd í trimum ella fýra umførum heldur enn í einum. Men Páll á Reynatúgvu vildi bert fremja sítt og kundi ikki góðtaka, at varalimur hevði aðra hugsan.

Restina av søguni kenna fólk. Men Landsstýrismaðurin og floksformaðurin kendu støðu mína í fleiri vikur.

**Langt frá 6-7 millónum**

Páll á Reynatúgvu sigur heldur ikki satt um upphæddina, hann fær minni at ráða yvir, nú hann tók uppskotið um uppihaldspening aftur. Hann hevur sagt 6-7 milliónir við pressuna. Hetta kann illa passa, tí samlaða endurgjaldið í samband við uppihaldspening er umleið 7 milliónir árliga. Landsstýrismaðurin skuldi undir øllum umstøðum havt goldið út fyri fyrra helvt av 2003, og hevði hann tí í mesta lagi spart umleið 3,5 milliónir. At landsstýrismaðurin so kanska hevði roknað við, at persónar, sum hava eftirstøðu, høvdu nýtt høvi at goldið hesa ella partar av henni fyri at fáa helvtina endurgoldið, er ein onnur søga. Um tey, sum hava eftirstøðu, hava havt ætlanir um at gjalda, um uppskotið bleiv samtykt, so kunnu tey eisini gjalda, nú uppskotið er tikið aftur. So hví ikki fara beinleiðis eftir teimum, sum hava eftirstøðu heldur enn at áleggja teimum sum gjalda, at gjalda dupult? Landsstýrismaðurin hevur nú eitt hálvt ár til at fáa inn eftirstøður og har við ríkiligt av peningi til raksturin.

**Illa dámt mál millum tingfólk**

Nakað annað er so tað, at málið um uppihaldspening var eitt av teimum málunum, sum var stak illa dámt millum tingfólk. Nógv vóru tey, sum aftan á afturtøkuna søgdu, at tey í veruleikanum ongan trupulleika høvdu av tí. Og tá landsstýrismaðurin sigur, at málið hevur verið væl og virðiliga viðgjørt í flokki og samgongu, so er tað sannleiki við modifikatiónum. Tí málið varð ikki viðgjørt nágreiniliga, áðrenn fíggjarlógin varð samtykt, og tá var ov seint at fáa innlit. Viðmerkingarnar frá meirilutanum í Trivnaðarnevndini vísa eisini greitt, at tingfólk hava ikki havt grundgevingar fyri, at mæla fólki til at taka undir við málinum. Tí valdi sami meiriluti at skriva, tað teir skrivaðu. Tá er ólíka at lesa viðmerkingarnar frá minnilutanum. Og var munurin einfalt, at minnilutin hevði eina sak, meðan meirilutin ikki hevði tað.

**Øvundsjúka og samvitska**

Nú hevur landsstýrismaðurin dúliga válkað sær í persónligum útspillingum av mær, hann hevur eisini í fleiri førum víst á, at eg ikki eri valdur og ongan tíð verið tað, meðan hann er valdur til bæði eitt og annað. Allar leiðir liggja opnar fyri honum, meðan eg eri á blindvegi ávegis myrkrinum. Og tí fær landsstýrismaðurin ikki annað burturúr, enn at at eg geri botnar í øvundsjúku og hevndarhugi. Landsstýrismaðurin hevur so týðiliga og klárt víst, at hann hvørki í hesum ella øðrum málum tekur samfelagslig ella sosial atlit, hann hugsar bert og bert í maktterminologium. Hetta kemur m.a. til sjóndar, tá hann ikki hevur annað at siga við Dimmalætting um málið um uppihaldspening enn at samanbera tað við ein ølkassa. Eitt mál, sum hevur álvarsligar avleiðingar fyri nógv, tað sær landsstýrismaðurin sum ein ølkassa pr. mann. Og soleiðis er eisini mesta hugsan landsstýrismansins um viðurskifti á almannaøkinum. Hann hugsar um orðavalið og tosar annars í yvirskriftum. Innlit og áhugi hava minni at siga. Nei, eg eri langt frá øvundsjúkur ella hevndarhugaður. Eg eri keddur av, at Tjóðveldisflokkurin, tá hesin fekk møguleikan, valdi ein slíkan landsstýrismann í almannamálum. Eg leggi ikki framtíð mína í vónina um ella tráðanina eftir at verða valdur, eg livi nú, og eg havi tað gott bæði privat og til arbeiðis. Havi fingið eitt týdningarmikið og avbjóðandi starv. Og tí hevur tað ikki so nógv at týða fyri meg, hvat Páll á Reynatúgvu verður valdur til. Eg vildi bert ynskt, at hann var okkurt annað enn landsstýrismaður í almannamálum. At hann verður valdur til at útinna starv, hann hevur áhuga fyri. Men tað er nú ikki bara Páll á Reynatúgvu, sum manglar áhuga fyri almannaøkinum. Hetta er tíverri heldur reglan enn undantakið á Føroya løgtingi. Almannaverkið kostar einar seks ferðir meira enn Strandferðslan, sum hóast tað fær seks ferðir so nógva umrøðu í tinginum.

Um so Páll á Reynatúgvu eina ferð setur seg í løgmansstólin, so fari eg altíð at hava størsta áhugan fyri samfelags- og almannamálum. Fari altíð at royna at virka í samsvari við samvitskuna. Hetta er torført hjá øllum politikarum, men var málið um uppihaldspening eitt av teimum, sum samvitska mín sýtti mær fyri at taka undir við. Og hevði eg verið tingmaður fyri jól, hevði eg heldur ikki atkvøtt fyri hesi fíggjarlógini, um hon m.a. bygdi á at avtaka stuðulin til uppihaldspening.

Onkur kann siga, at eg eri góðtrúgvin, at eg eri avmarkaður, tá eg sigi, at í føroyskum politikki eru hugtøk sum maktgirnd og einaræðislyndi komin í hásæti, meðan samvitska er vorðið eitt ókvæmisorð. At alt snýr seg um yvirskriftir og annars lokalar smálutir, meðan veruligur realpolitikkur er vorðið eitt ókvæmisorð. Men nakað soleiðis síggi eg ein av breddunum yvir dagsins politikki, og hóvar mær hetta als ikki.

Eg veit sum sagt ikki, um Páll á Reynatúgvu er øvindsjúkur, men okkurt álvarsligt er í hvussu er áfatt við landsstýrismaninum.

## Svenning heldur fram sum formaður

**Tíðindaskriv**

Sinnisbati hevði aðalfund leygardagin 3. mai. Fyri vali stóðu Svenning av Lofti, Margreta Poulsen og Soffi Egholm, sum øll vórðu afturvald. Eykalimirnir Guðri í Bartalsstovu og Dagunn Olsen, stóðu eisini fyri vali, men vórðu afturvaldar. Umframt varð eisini Asta Vágadal Joensen vald sum eykalimur.

Nevndin hevur skipað seg soleiðis:
Svenning av Lofti, form.
Soffi Egholm, næstform.
Margretha Poulsen, varanæstform.
Arnfinnur Poulsen, kassameistari
Tummas Thomassen, skrivari
Eykalimir eru:
Guðri í Bartalsstovu
Dagunn Olsen
Asta Vágadal Joensen.

**HAVNAR BIO**
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo



Mikudagin 07.05. kl. 20$^{00}$
Mikudagin 07.05. kl. 22$^{45}$
Hósdagin 08.05. kl. 20$^{00}$
Hósdagin 08.05. kl. 22$^{45}$



Mikudagin 07.05. kl. 20$^{45}$
Hósdagin 08.05. kl. 20$^{45}$



Mikudagin 07.05. kl. 18$^{45}$
Hósdagin 08.05. kl. 18$^{45}$



Mikudagin 07.05. kl. 23$^{00}$
Hósdagin 08.05. kl. 23$^{00}$
- Seinasta sýning -



Mikudagin 07.05. kl. 18$^{00}$
Hósdagin 08.05. kl. 18$^{00}$
- Seinasta sýning -

KOMANDI FILMUR



Frumsýning
Fríggjadagin 09.05

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu